**Arbeiðsloysisskipanin**
Tinghúsvegur 14 • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel +298 349 550 • Faks +298 349 551 • T-postur als@als.fo

# Umsókn

## um upptøku í Fiskavirkisskipanina hjá Arbeiðsloysisskipanini

**Leiðbeining**

Fyri at fiskavirkið kann verða umfatað av Fiskavirkisskipanini, skulu niðanfyri standandi treytir verða loknar:

Fiskavirkið skal:

1. Støðugt fáast við tilvirking av fiski ella fiskaúrdráttum,
2. hava løggilding ella samsvarandi góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til tilvirking av fiski,
3. hava upplýst Arbeiðsloysisskipanini ætlað tal av starvsfólkum, knýtt at fiskavirkisskipanini. Upplýsta talið av starvsfólkum skal ikki vera hægri enn samsvarandi tilvirkingargongdini hjá virkinum, vanliga framleiðslutíð virkissins, og
4. hava sent Arbeiðsloysisskipanini skrivliga umsókn um at koma undir fiskavirkisskipanina saman við skjalprógvum fyri nr. 1 – 3.

Avrit av løggilding ella samsvarandi góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til tilvirking av fiski skal latast inn saman við hesum umsóknarblaðnum.

Umsóknarblaðið skal fyllast út við spjaldrastavum, og sendast Arbeiðsloysisskipanini. Postadressan er:

**Arbeiðsloysisskipanin**
**Postsmoga 3022**
**110 Tórshavn**

| Virkisnavn: | | V-tal: |
|---|---|---|
| Kontaktpersónur: | | |
| Býlingur/Gøtunavn, nr.: | | |
| Postsmoga: | Postnr.: | Býur/bygd: |
| Telefon: | Teldupostur: | Telefaks: |

**Skyldir virkisins:**
Tað er m.a. skylda virkissins at veita upplýsingar um ávís arbeiðsviðurskifti hjá starvsfólkunum, sum eru í fiskavirkisskipanini, sí Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum, dagfest 24. august 2000. Hetta hevur m.a. við sær, at fiskavirkið, skal:

- veita ávísar upplýsingar í umsóknarblaðnum hjá starvssfólkunum
- útflýggja starvsfólkunum FV-kort har upplýsingar eru givnar um arbeiddar tímar, inntøku v.m.
- vátta møguliga móttøku av FV-kortunum frá starvsfólkunum
- senda Arbeiðsloysisskipanini innlætnu FV-kortini eftir nærri ásetingum
- fráboða allar broytingar, sum viðvíkja viðurskiftum í sambandi við fiskavirkisskipanina

Í § 2, stk. 1, nr. 1 og stk. 4 og 5 í Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum er ásett, at virkið skal:

> *"Støðugt fáast við tilvirking av fiski ella fiskaúrdráttum, sí stk. 4-5"*
>
> *"Stk. 4. Talan kann vera um fleiri tíðarskeið, fiskavirkið hevur støðuga tilvirking í einum ári. Hesi tíðarskeið skulu í minsta lagi ætlast at vara 6 mánaðir innan næsta 12 mánaða skeiðið, og hvørt tíðarskeið skal ætlast at vara longri enn 2 mánaðir."*
>
> *"Stk. 5. Fiskavirki, ið eftir ætlan bert tilvirkar fisk ávísar dagar í vikuni, er ikki fevnt av hesi kunngerð tann part av vikuni, tá ongin tilvirking er."*

**Nær er virksemi á virkinum?**

| | |
|---|---|
| Frá hvørjum degi ynskir virkið at verða fevnt av fiskavirkisskipanini: | ☐☐ Dagur ☐☐ Mánaður ☐☐☐☐ Ár |
| Hvørji tíðarskeið í árinum ætlar virkið at tilvirka fisk ella fiskaúrdráttir:<br>Frá (dagf.): ____________ til (dagf.): ____________<br>Frá (dagf.): ____________ til (dagf.): ____________<br>Frá (dagf.): ____________ til (dagf.): ____________ | ☐ Alt árið |
| Hvørjar dagar í vikuni ætlar virkið at tilvirka fisk ella fiskaúrdráttir (setið x):<br>☐ Mánadag ☐ Týsdag ☐ Mikudag ☐ Hósdag ☐ Fríggjadag | ☐ Alla vikuna |

**Stutt lýsing av framleiðsluni:**

| Hvørjar vørur er ætlanin at framleiða: | | | Hvørji fiskasløg er ætlanin at tilvirka (setið x): |
|---|---|---|---|
| | **Vørubólkar:** | **Framleiðsluorka (rávøra í ton.):** | ☐ Laksur |
| 1. | ____________ | ____________ | ☐ Toskur |
| 2. | ____________ | ____________ | ☐ Hýsa |
| 3. | ____________ | ____________ | ☐ Upsi |
| 4. | ____________ | ____________ | ☐ Kongafiskur |
| 5. | ____________ | ____________ | ☐ ____________ |
| | ____________ | ____________ | ☐ ____________ |
| | ____________ | ____________ | ☐ ____________ |

Í § 2, stk. 1, nr. 3 í Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum er ásett, at virkið skal:

> *"hava upplýst Arbeiðsloysisskipanini ætlað tal av starvsfólkum, knýtt at fiskavirkisskipanini. Upplýsta talið av starvsfólkum skal ikki vera hægri enn samsvarandi tilvirkingarorkuni hjá virkinum, vanliga framleiðslutíð virkissins,"*

**Tal av starvsfólki:**

| |
|---|
| Hvussu nógv starvsfólk skulu verða umfataði av fiskavirkisskipanini: |

**Hvørja lønarskipan nýtir virkið?**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Teldulønarskipan frá Com-Data | ☐ | | |
| Aðra teldulønarskipan | ☐ | Hvørja: | ______________________ |
| Manuella lønarskipan | ☐ | | |

**Hevur virkið fingið útflýggjað** (setið x)**:**

| | | |
|---|---|---|
| Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing | Ja ☐ | Nei ☐ |
| Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum frá 24.08.2000 | Ja ☐ | Nei ☐ |
| Faldaran um FV-kortið | Ja ☐ | Nei ☐ |
| FV-kalendaran | Ja ☐ | Nei ☐ |

**Viðmerkingar:**

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

**Váttan:** Upplýsingar latnar á hesi umsókn, kunnu kannast av eftirlitinum, við heimild í § 27 í Løgingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

| |
|---|
| Váttað verður undir trúnaðartreytum, at givnu upplýsingar eru sannar. Somuleiðis binda vit okkum at geva Arbeiðsloysisskipanini boð um allar broytingar í viðurskiftum á virkinum ella hjá tilknýttum starvsfólkum viðvíkjandi omanfyri nevndu spurningum og annars um viðurskifti, sum kunna hava týdning fyri Arbeiðsloysisskipanina. |
| ____________________ Dagfesting     ____________________ Undirskrift vegna virkið |

(Víst verður til Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing við seinni broytingum og Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli til arbeiðsleys á fiskavirkjum, dagfest 24. august 2000)

# Vegleiðing til umsóknarblaðið

**Umsókn um at verða umfatað av fiskavirkisskipanini:**
Fiskavirkið verður ikki umfatað av fiskavirkisskipanini fyrr enn frá tí degi, skrivlig umsókn er móttikin á ALS (talan nýtist ikki at vera um hetta umsóknarblað). Tó er neyðugt, at virkið hevur fylt út og aftursent hetta umsóknarblað við neyðugum upplýsingum innan 14 dagar eftir, at virkið hevur latið ALS aðra umsókn. Annars fellur umsóknin aftur.

Niðanfyri er vegleiðing til ávísar av útfyllingarteigunum í umsóknarblaðnum.

**Nær er virksemi á virkinum?**
Virkið verður biðið um at upplýsa, frá hvørjum degi tað ynskir at verða umfatað av fiskavirkisskipanini. Vísandi til, at kunngerðin kemur í gildi 25. september 2000, kann virkið í fyrsta lagi verða umfatað av skipanini frá hesum degi. Sum omanfyri nevnt, er heldur ikki møguligt at verða umfatað av fiskavirkisskipanini fyrr enn frá tí degi, ALS hevur móttikið umsókn.

**Stutt lýsing av framleiðsluni:**
Virkið verður biðið um at upplýsa, hvørja framleiðslu ætlanin er at hava. Bæði tá talan er um vørubólkar (t.d. fesk fløk, rogn, royktan laks, saltaði fløk), umframt hvussu nógv ætlanin er at framleiða í hvørjum bólki. Somuleiðis skal virkið upplýsa, hvørjum fiskasløgum ætlanin er at framleiða úr. Tómir teigar eru, har fiskasløg, ið ikki eru nevnd á yvirlitinum, kunnu skrásetast.

**Tal av starvsfólki:**
Sum nevnt omanfyri henda útfyllingarteig, verður í kunngerðini álagt fiskavirkinum at upplýsa, hvussu nógv starvfólk skulu verða knýtt at skipanini; og sum nevnt, skal hetta tal ikki vera hægri enn samsvarandi tilvirkingarorkuni hjá virkinum.

**Hvørja lønarskipan nýtir virkið?**
Orsøkin til, at spurt verður um hetta, er m.a., at ALS ynskir at hava yvirlit yvir tey virki, ið nýta teldulønarskipanina hjá Com-Data, vísandi til at hesi hava møguleika fyri at lesa upplýsingarnar um vunna inntøku v.m. hjá teimum arbeiðsleysu maskinelt inn á FV-kortini.